# Nýggjan marknað til føroyska hýsu í Stórabretlandi

Jógvan Hansen

Kósin

*“Faroese Haddock is back”*

# Innleiðing

- Endamálið við verkætlanini.
- Úrslit av marknaðarkanning.
- Samskifti við størsta fiskainnkeypara í Stórabretlandi.
- Menning av marknaðarføringskonsepti saman við Mensch.
- Niðurstøða.

# Endamálið við verkætlanini

- Skapa karmar fyri einum nýggjum marknaði fyri føroyskari hýsu í Stórabretlandi.
- Í tráð við raðfestu økini í programminum fyri fiskivinnuroyndir er ætlanin við hesi verkætlan
  - at “fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir”
  - at “fáa góðskuváttanir í øllum liðum”
- Harumframt stimbrar verkætlanin undir *burðardyggan fiskiskap* eftir hýsu, tá MSC-góðkenning er ein fortreyt.
- Málið skal náast við
  - Marknaðarkanningum
  - Menning av marknaðarføringskonsepti
  - Marknaðarføringsátøkum í strategiskum samstarvi

# Marknaðurin er har og er svangur

- Orsakað av covid-19 er tann bretski brúkarin farin at keypa online og take-away.
- Kanningarnar visa, at heili 87% av bretsku fiskakeyparunum ynskja, at vøran, teir keypa, er burðardygg.
- Hagtøl vísa, at hýsufiskiskapurin í Norra er lækkaður seinastu árini, hetta gevur vakstrarmøguleikar.
- Hýsan, sum verður veidd av føroysku línubátunum, verður seld til Onglands og USA.

# Eitt gylt høvi at gagnnýta MSC góðkenning

- Fyri 15-20 árum síðani fór nógv hýsa til bretska retailmarknaðin, men so kom krav um MSC, og samstarvið slitnaði.
- MSC góðkennir føroyska hýsufiskiskapin í 2021.
- Kósin hevur BRC-góðkenning, sum er ein matvørustandardur ásettur av bretskum retailarum.
- Hetta gevur eitt gylt høvi at flyta seg ‘up stream’, so vit eru tættari retailkundanum.

# Young’s sýndi stóran áhuga fyri føroysku hýsuni




- Vit kannaðu marknaðin, og komu til ta niðurstøðu, at Young’s var tann, vit skulu royna at sleppa fram at.
- Young’s settu í verk stórsligna marknaðarføringskampanju í 2020, har tey brandaðu seg mótvegis sínum 33 milliónum viðskiftafólkum, sum “the UK’s largest seafood specialist’s 200 years of expertise to inspire people to cook and enjoy fish more often”.
- Young’s vóru í fyrstu atløgu áhugaði í einum samstarvi, har vit á Kósini fingu fund við leiðandi persónar innan fiskavøruinnkeyp hjá Young’s.

# Springaradrápið

- Nógv samskifti bleiv eftir springarardrápið.
- Á fundi við Youngs í novembur 2021 var ein stór broyting hend: Søgan um springaradrápið á Skálafjørðinum fylti nógv.
- Young's ynskti tí greiðar útmeldingar frá landsins myndugleikum í Føroyum viðvíkjandi springaradrápum.



# Mensch selt Føroyar sum ferðamál, nú eisini hýsuna til bretska marknaðin

- Farið var síðani undir at menna eitt marknaðarføringskonsept, sum saman við eini PR-strategi skuldi tryggja, at boðskapurin røkkur út til valda málbólkin, t.e. serliga kundabólkarnar hjá Young's.

- Fyri at gera menningararbeiðið professionelt og við altjóða dygd, valdi Kósin/JFK at seta seg í samband við Rune Hørslev frá donsku samskiftisfyritøkuni Mensch.

- Rune Hørslev kennir væl til føroysk viðurskifti, tá hann hevur ment fleiri av marknaðarføringskonseptunum hjá Visit Faroe Islands, sum av álvara hava sett føroyska ferðavinnu á heimskortið.

- Fundur bleiv hildin við Mensch í desember 2021, har greitt bleiv frá marknaðarkanningini og møguliga samstarvinum við Young's umframt tørvinum á at marknaðarføra júst MSC-góðkendu hýsuna mótvegis nýggjum marknaðum, eitt nú á fiskivinnumessum uttanlands.

# Marknaðarføringin er farin í gongd - við lágum blussi fyribils

- Eitt marknaðarføringskonsept er ment til endamálið. Ein tann mest týðandi bretski fiskainnkeyparin, Young's, hevur sýnt ítøkiligan áhuga í einum strategiskum samstarvi um marknaðarføringsátøk og sølu av føroyskari hýsu á bretska marknaðinum.
- Marknaðarføringin bleiv roynd á fiskivinnumessuni í Barcelona á várið 2022, har fiskakeyparar vóru áhugaðir í nýggja møguleikanum at keypa MSC-góðkenda hýsu úr Føroyum.
- Men afturmeldingin frá Young's er tó, at so leingi føroyingar framhaldandi drepa springarar og loyva stórum drápum, sum á heysti 2021, vil stóri bretski fiskakeyparin ikki fara undir strategiskt samstarv um sølu og marknaðarføring av hýsuni á bretska marknaðinum.
- Hetta var ein týðandi fortreyt fyri at verkætlanin skuldi eydnast.
- Sjálvt lýsingarfilmurin kann ómakaleyst dagførast ella broytast.

# “Faroese Haddock is back”

- “Faroese Haddock is back” marknaðarføringskonseptið bleiv síðani ment og framleitt í samstarvi við Mensch og Kovboy Film.
  - Konseptið byggir á fakta um føroyska hýsuveiðu, har útlendsku keypararnir skulu kunnast um veiðuhagtølini, sum liggja til grund fyri MSC-góðkenningini. Eisini skulu aðrar dygdir við føroysku hýsuveiðuni takast fram.
- Úrslitini av konseptmenningini er:

- Lýsingarfilmur, sum í høgari góðsku og gjøgnumførdum stíli greiðir frá føroysku hýsuni og burðardyggu veiðuni.
- Framløgutilfar til eitt nú sølumessur og kundavitjanir.
- Háli-upp bannarar.
- Faldarar við neyvari kunning í teksti.

# “Faroese Haddock is back”



# Niðurstøða

- Um vit skulu fáa samstarv við Young’s, mugu vit gevast við at drepa springarar.
  - Springaradrápið spilti spælið.
- Vit kanna í løtuni aðrar keyparar, sum vilja góðtaka, at vit drepa springarar. Enn er eingin funnin.
- Vit brúka enn filmarnar til at marknaðarføra okkum á messum.

Takk fyri

